lívdin
- í lívd hins hægsta

Februar 2008



# Framíhjárættur at vera saman við Swindoll



Charles R. Swindoll og Jógvan Zachariassen

Jógvan var í USA í januar í sambandi við doktara-ritgerðina, sum hann arbeiðir við. Áðrenn hann sleppur í gongd við at skriva, skal hann gjøgnum nakrar royndir og venjingar. Í hesum sambandi fekk Jógvan tann framíhjárætt at vera saman við kenda talaranum og pastorinum Charles R. Swindoll í fleiri dagar og fekk persónliga vegleiðing frá honum. Swindoll hevur skrivað nógvar bøkur. Ein tann kendasta er bókin “The Grace Awakening” – “Náðiveking”.

## Tit eru útvald ætt

*"Men tit eru útvald ætt, kongligur prestaskapur, heiløg tjóð, ognarfólk, fyri at tit skulu kunngera dygdir Hansara, sum kallaði tykkum úr myrkrinum inn í undurfulla ljós Sítt" (2. Pæt. 1:9).*

Tað verður mangan tosað um allar tær signingar, sum vit eiga frá Gudi – at vit eru útvald ætt, kongligur prestaskapur, heiløg tjóð, ognarfólk, bjargað út úr myrkrinum inn í ljósið o.s.fr. Vit eru Gudi sera takksom og tosa saman um, hvussu gott tað er at njóta signingar Guds. Men vit gloyma tíverri mangan endamálið við signingum okkara: "Fyri at tit skulu kunngera dygdir Hansara!" Latið okkum minnast, at alt tað, sum vit hava fingið frá Gudi, hava vit fingið til tess, at vit við størri ídni og eldhuga skulu tilbiðja Harran og lyfta navn Hansara upp í landi okkara.



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Daisy og Ásbjørn gullbrúdleyp



Fríggjadagin 11. jan. 2008 høvdu hjúnini Daisy og Ásbjørn Viderø í Hoyvík gullbrúdleyp. Daisy, f. Mellemgaard, er úr Klaksvík og Ásbjørn úr Havn. Fyrstu tíðina eftir, at tey giftust í 1958, búðu tey í Havn. Síðan fluttu tey í 1961 til Viðareiðis og festu Miðstovugarðin í 1962. Tey búðu á Viðareiði til 1996, tá tey fluttu til Klaksvíkar. Síðan 2004 hava tey búð í Hoyvík. Daisy og Ásbjørn eiga fýra børn: Petra, Birgitte, Dánial og Hallgerð, sum øll búgva í høvuðsstaðnum. Barnabørnini eru níggju í tali. Vit ynskja gullbrúðarparinum hjartaliga tillukku við degnum.

## Jórun og Árni silvurbrúdleyp



Mánadagin 21. januar 2008 høvdu hjúnini Jórun og Árni Jakobsen í Havn silvurbrúdleyp. Jórun er av Argjum og Árni úr Havn. Jórun er sjúkrarøktarfrøðingur. Árni er verkfrøðingur og rekur egið virki í Havn. Jórun og Árni eiga fimm børn: Pætur, Barbara, Rakul, Rebekka og Kristina. Vit ynskja Jórun og Árna hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum.

## Regin Nolsøe 50 ár



Týsdagin 8. januar fylti Regin Nolsøe í Hoyvík 50 ár. Regin er havnarmaður og var í mong ár ein av leikarunum á besta liðnum hjá HB. Hann er elinnleggjari og hevur egið virki. Regin er giftur Katrin, f. Sørensen, úr Havn. Tey eiga synirnar Hjørt og Dávid. Regin eigur eisini sonin Ken, sum lærir til flogskipara í Danmark. Vit ynskja Regini hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

## Alisa og Ási í grønlandi



*Ási Joensen og Alisa Hammer*

Fyrst í desember greiddu Alisa Hammer og Ási Joensen, sum búgva í Uummannaq í Grønlandi, frá arbeiði sínum á einum barnaheimi har. Tað var sera áhugavert at hoyra tey greiða frá, og hvussu nógv tey gjørdu fyri børnini undir heilt øðrvísi umstøðum, enn vit kenna til. Alisa er pedagogur á barnaheiminum. Ási arbeiðir eisini hjá eini entreprenørfyritøku. Tey fóru yvir aftur til Grønlands 10. januar, og tey vilja fegin, at vit biðja fyri teimum og arbeiðinum millum børnini.

## Nýtt heiti og øðrvísi útsjónd

Telduskrivið, sum Lívdin sendir út eina ferð um vikuna, hevur skift navn frá »Innanhýsis tíðindi« til »Kunningarrit«. Útsjóndin er frískað upp og litirnir nýggir og meira innbjóðandi. Ætlanin er, at Kunningarritið framhaldandi verður sent út miðskeiðis í hvørji viku sum partur av kunningarpakkanum hjá Lívdini.

## Heimasíða fyri ungdómin

Ungdómurin í Lívdini hevur í eina tíð havt sína egnu heimasíðu, sum er www.ung.livdin.fo.

## Bønarbólkur fyri kvinnur

Fyrsta leygardag í hvørjum mánaði savnast bønarbólkurin fyri kvinnur.
Áhugað kunnu venda sær til Onnu Mariu Anthoniussen (tel. 228826) ella Poulu Sørensen (220429).

## Ársveitslan hjá Lívdini

Leygarkvøldið 26. januar varð ársveitslan hjá Lívdini hildin í Oasuni í Hoyvík.

Veitslan var hugnalig við nógvum ymiskum á skránni sum t.d. skemti, sangkapping, spurnarkapping og mótaframsýning. Eisini var góður matur at fáa. Umleið 180 fólk vóru til ársveitsluna.




*Myndir frá ársveitsluni*

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3



(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing, bøn og bønarskúli týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 5. feb. | Skeið 3 – Andaligu gávurnar og tænastan í samkomuni (JZ) |
| 12. feb. | Skeið 3 – Andaligu gávurnar og tænastan í samkomuni (JZ) |
| 19. feb. | Húsbólkarnir savnast (einki møti) |
| 26. feb. | Bønarlív Jesusar (JZ) |

**Lívsdroparnir**

Lívsdroparnir er eitt tiltak fyri børn frá 1. flokki og uppeftir. Børnini møta mánadag kl. 17.

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



Poul



Eivind



Jógvan



Absalon



Poul

### Sunnudagin 3. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Arbeiðið í Papua Ný Guinea*<br>*Talari: Poul Joensen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Kristin í Kina*<br>*Talari: Eivind Frøen* |

### Sunnudagin 10. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Vitnisburðir*<br>*Tey ungu luttaka* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (6)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 17. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Opið evni*<br>*Talari: Absalon Áargarð* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Frá steinhjarta til kjøthjarta (7)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 24. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Opið evni*<br>*Talarar: Sunnudagsskúlin luttekur* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00 | *Evni: Opið evni*<br>*Talari: Poul Guttesen* |

Ungdómsmøti er í Hoyvíkar skúla fríggjakvøld kl. 21.00.

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*